## Barnagudstænasta á Argjum sunnudagin



Sunnumorgunin klokkan 11 verður barnagudstænasta fyri alla familjuna í Argja kirkju. Tað verður Bergur Debes Joensen, sum verður prestur, og hann sigur, at aftan á gudstænastuna verður kirkjukaffi og okkurt gott til børnini eisini. Prestur sigur, at øll eru vælkomin!

## 86. konsert hjá Føroya Symfoniorkestri

Fríggjakvøldið 5. mars klokkan 20 í Løkshøll og leygardagin 6. mars klokkan 19.30 í Norðurlandahúsinum hevur Føroya Symfoniorkestur sína várkonsert. Á skránni: symfoni nr. 1 eftir Johannes Brahms og klaverkonsert nr. 2 eftir Sergei Rachmaninoff. Solistur: Alexandre Pirojenko úr St. Petersburg. Dirigentur: Bernhard Wilkinson. Hetta verður 86. konsertin hjá Føroya Symfoniorkestri, og verður her sett fram ein sera áhugaverd og spennandi skrá, sum verður framførd í Norðurlandahúsinum við kendu og sera vælumtóktu fyrstu symfoniini av Johannes Brahms og síðani sera stórfingnu klaverkonsertini eftir Rachmaninoff við solisti úr sjálvum St. Petersburg, har Sergei Rachmaninoff í sínari tíð studeraði.

# fyri 116 miljónir krónur




*Tað hevur gingið væl hjá nýggju Norðborg, síðan skipið fór fyrsta túrin beint eftir hvítusunnu í fjør*
Mynd: Jens Kr Vang

# Sløk 70 tons fyri miðalprísin 14,25 krónur fyri kilo

**FISKAPRÍSIR**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár seldi Fiskamarknaður Føroya tilsamans 68,2 tons á uppboðssølu fyri 972.000 krónur.

Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt var 14,25 krónur fyri kilo.

Eini 18 tons vóru av toski, og størstar vóru nøgdirnar av toski 3. Her var miðalprísurin 13,96 krónur fyri kilo.

Besti miðalprísurin fyri tosk á fiskamarknaðinum í gjár, var fyri bestu toskastøddina, tosk 1, sum fekk miðalprísin 21,07.

Eini 16 tons vóru av hýsu, men eins og verið hevur leingi, var hýsuprísurin einki serligur í gjár.

Besta hýsan, hýsa 1, fekk miðalprísin 8,74 krónur fyri kilo, meðan 8,4 tons av hýsu 2 fóru fyri einans slakar 7 krónur fyri kilo.

Eini 18 tons vórðu eisini seld av havtasku, og her var besti miðalprísur 27,59 krónur fyri kilo.

Vit kunnu leggja aftrat, at umleið 4,3 tons vórðu seld av upsa-og toskarognum.

Prísurin fyri toskarognini var 8 krónur fyri kilo, og fyri upsarognini var hann 6 krónur fyri kilo.



*Prísirnir á hýsu eru framvegis lágir, og soleiðis var sølan í gjár á Fiskamarknaði Føroya einki undantak*